# TILTØK

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv. 75*
Møti sunnumorgunin kl. 10.30 Breyðbróting, barnaansing verður eisini.
Mánakvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin á familjumøtinum kl. 10.30 talar Elsa í Skorini um evnið »Góðir vanar í familjuni«. Á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 talar Rólant í Skorini um »Er Gud?«. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Drekkamunnur verður millum møtini.
Sunnudagsskúlin er kl. 12.
Týskvøldið kl. 20 Møti.
www.livdin.fo

**Missiónshúsið við Landavegin**
Hóskvøldið kl. 20 Møti.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Johan Henriksen.

**Fríkirkjan Oasan, Uppi á Brekku 3**
Í kvøld kl. 20 Ungdómsmøti v/ Jóhan P. Johannesen.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ víkafólki.
Mánakvøldið kl. 20 Kirkjufundur.
Mikumorgun kl. 7 Bøn.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Torsten Jortzick prestur, í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli. www.katolsk.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Hósdag kl. 20 Heimaforbundið – fyri allar kvinnur.
www.salvos.com/torshavn

**Meinigheitshúsið**
Hósdagin kl. 20 Ungdómsmøti.
Fríggjadagin kl. 19.30-21.30 Juniorhugni.
Missiónsvika verður í døgunum 23.-30. jan.:
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, Barnakórið á Argjum syngur. Kl. 18 Møti v/ Snorra Brend, Thaborkórið av Toftum syngur.
Mánadagin kl. 20 Møti v/ Regin Høgnesen, Kristiliga Sangkórið syngur.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli og kl. 12 verður eisini Møti, har Virgar Hvidbro talar.
Kl. 18 verður Evangel. møti, har Páll Poulsen talar.
www.hebron.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Hósdagin kl. 19.30 í KFUK: Bíbiltími við Jógvani Fríðrikssyni presti. Evnið: 4. boð. ABC. Evnið: »At liva í kærleika«. 2. partur v/ Liljan Jacobsen, kl. 18 Møti v/ Ólavur guttesen.
Mánadagin kl. 20 Bønarskúlin.
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067.
www.filadelfia.fo

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Í morgin kl. 20 Ungdómsmøti v/ Karin Rasmussen, evnið er »At kenna Gud«.
Leygardagin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Jóni Johannesen, kl. 11.50 Sunnudagsskúli og

**Frá Ebenezer**
Hósdag kl. 10 Fyrrapartsløta fyri eldri menn í Sloans húsi, kl. 17 Sangvenjing – eldra barnakórið, kl. 20 Kvinnumøti: Talari Christy Jacobsen, ið virkar sum trúboðari saman við manninum Dan í Mongolia, Ulaanbaatar, kl. 20 Ungdómsmøti.
Fríggjadag kl. 20 Teen-Night.
Sunnudag kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti.
Mánadag kl. 17 Kvinnur koma saman við bøn í Sloans húsi. Øll eru vælkomin.
www.ebenezer.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Vestmanna missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 19 Møti v/ Jóhannes Danielsen.

**Saron, Vestmanna**
Í kvøld verður frítíðararbeiði kl. 19.
Leygarmorgunin verður Bíbliuseminar við David Bech. Byrjað verður við morgundrekka kl. 9.00.
Sunnudagin Evangel. møti kl. 18. Náttturði verður aftaná. Verið hjartaliga vælkomin.

**Meinigheitshúsið, Sandavágur**
Missiónsvikan heldur fram í kvøld kl. 20 Møti har Hjalmar Hansen talar og Sjá syngja.
Fríggjakvøldið kl. 20 Møti har Alfred Petersen talar og Streingjakórið úr Vágum syngur.
Leygarkvøldið kl. 19 Møti har Pól Johannesen talar og Ungdómskórið úr Vágum syngur. Kl. 22 verður Sangog vitnisløta við ungum úr Libanon í Sørvági. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 20 Stuðulskonsert fyri neyðstødd á SriLanka. Luttakandi bólkar verða: Jens og Kristen Lisberg, Magni Christiansen, Ecclesia og bólkur úr Lívdini.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Martin Olsen. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Hvalvíkar missiónshús**
Missiónsvikan heldur áfram í kvøld 20. jan. kl. 20 Møti við Sylverius Jaocbsen, Skála. Marita, Hallgerð og Jóhanna syngja.
Fríggjadagin 21. jan kl. 20 Møti við Mourits Mouritsen, Tórshavn, Meinigheitskórið syngur.
Leygardagin kl. 20 Møti við Sólbjørg Símunarson, Argir, Teir úr Kollafirði syngja. Innsavnan til húsið.
Sunnudagin kl. 15 Familjumøti við Marjon Poulsen, barnaráðg., kl. 18 Møti við Niels Jacob Nielsen, trúb. Torbjørn og Steintór syngja. Vit bjóða øllum at vera hjartaliga vælkomin til møtini við Filippibrævið 4,4.

**Samkoman Lívsins Orð Saltangará**
Hósdagin møta Tim5 og Liljur kl. 18.30.
Sunnudagin kl. 10.30 Møti.
Mánadagin kl. 20 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Blákrossfelagið Lamba, Skipanes, Søldarfjørður**
Sunnudagin kl. 18 verður Blákrossveitsla í Bønhúsinum í Søldarfirði. Talari verður Sverri Steinhólm, kórið í Søldarfirði kemur at syngja. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónsvika í Leirvík**
Hósdagin kl. 20 Møti við Niels J. Nielsen, Manskórið av Strondum syngur.
Fríggjadagin kl. 20 Møti við Øssur Kjølbro, KFUM og K kórið í Klaksvík syngur. Innsavnan til Heimamissiónina.
Leygardag kl. 10 Bíbliutími við Frants Jensen, kl. 20 Møti við Bergur D. Joensen, ungdómskórið av Glyvrum syngur.
Sunnudagin kl. 12 Gudstænasta við altarg., v/ Una Næs, presti, kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 19 Møti við Regin Høgnesen, Húsakórið syngur. Innsavnan til húsið. Drekka verður hvørt kvøld eftir møtini. Øll eru vælkomin.

**KFUM & K, Klaksvík**
Hóskvøldið kl. 20.30 venur gospelkórið »Gleðið«.
Fríggjakvøldið kl. 22 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18 Møti, kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin. www.kuff.fo

**Soli Deo Gloria**
Hósdagin kl. 20 Ungdómsmøti v/ Lilliane Svøðstein.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Preben Hansen.

**Getsemane, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti v/ Dánjal Petersen.
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við André Matras. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Leygarkvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsangsløta, kl. 18 Møti. Missiónsvikan verður í døgunum 17.-20. feb. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin. Missiónsvikan verður í døgunum 8. til 13. februar. Lýst verður nærri seinni.

**Missiónshúsið í Porkeri**
Missiónsvikan verður 22.-27. februar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin í Vági**
Hósdagin kl. 20 Barnakórið v/ Jens og Margrethu øvar.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti, Hallur Ludvig talar. Øll eru vælkomin.

**Møtir í »Framtíðini« í Vági**
fríggja-, leygar- og sunnukvøldið kl. 20. Hesi luttaka: Margar Toftegaard, Thomas J. Askham, Árni Kjærbæk, Jóanes Mortensen, Streingjakórið Porkeri, Ebba og Nimrod Midjord.
Bønartænastan svarar, ring 597597.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 17. januar*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Kortspæl, telving og onnur spøl.
kl. 14-17 Havnaprát, Birgar V. Johannesen. Tilm. til døgurðan mikud. og fríggjadag tlf. 316491
*Týsdagin 18. januar*
kl. 10.-11.30 Sangur, Benny – Flemming Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 Hugnaløta v/ M. C. Restorff
*Mikudagin 19. januar*
kl. 10.00–13.00: Matgerð. Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Døgurði. Høvi er at koma sum gestur. Tilm. tlf. 316491
*Hósdagin 20. januar*
kl. 10.00–10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11-11.45 Eingilsk talumál, Ásmundur Johannesen
kl. 14.00–17.00: Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14-16 Boccia í kjallaranum
*Fríggjadagin 21. januar*
kl. 10.00–13.00: Matgerð, Anne Grethe Harlou.
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur. Tilm. mánadag tlf. 316491
kl. 13-17 Opið hús
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Losjan í Havn Tinghúsvegur 18**
Fríggjadagin kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Dagtilhaldið Fløvi**
– í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tlf. 448279. Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag til fríggjadag kl. 15-18.
*Mánadagin 17. januar*
Fimleikur v/ Jóhannu Troest
*Týsdagin 18. januar*
Boccia
*Mikudagin 19. januar*
Petur Knudsen sigur frá sínum fyrsta túri til Grønlands
*Hósdagin 20. januar*
Myndaveving fyri áhugað v/ Rannvu Gøte
*Fríggjadagin 21. januar*
Opið Hús

*Hvønn dag ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Tú ert vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag frá kl. 14 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Bløðini eru eisini til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Malta, Hirtshals**
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

**Ørkin, Reykjavík**
Møti hvørt sunnukvøld kl. 20.30. Aftaná er kaffi.

**Evangeliska Røddin, Odense**
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

**Eliaskirkjan**
Møti er hvørt leygarkvøldið kl. 19 í kjallaranum í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 5 min. at ganga frá Hovedbanegården, 2 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 og 550S steðga nærhendis. Sunnudagsskúli er í Eliaskirkjuni hvønn sunnudag kl. 14 í kjallaranum og kl. 11 í barnarúminum á Oyrasundskollegiinum, Dalslandsgade 8 á Amager. Øll eru vælkomin. Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32969995 ella Róa Rasmussen tlf. 32886480. E-mail: ek_fo@get2net.dk

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Vágs Pensionistafelag**
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll oman fyri 60 ár eru vælkomin.
Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

## Brúdleyp

Leygardagin 15. januar giftust í Prestagarðinum í Vestmanna Súsanna Davidsen, ættað úr Hósvík og Emil Petersen, Kollafjørður.

Leygardagin 26. februar kl. 10.00 giftast í Rituvíkar kirkju Hanna Olsen, Rituvík og Ásmundur Hansen, Søldarfjørður. Vælkomst verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 16.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið, verða biðin um at ringja á tlf. 442036, 254250, 504970 ella 441396, 447774. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 5. mars kl. 16.00 giftast í Hvalbiar kirkju, Bettina Cjouanita Tummasardóttir Hentze úr Skopun og Dávur Holm úr Hvalba. Veitslan verður hildin í Roynhøllini í Hvalba frá kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið á teirra stóra degi, verða vinarliga biðin um at tekna seg á tlf. 260440, ella aftaná kl. 18.30 á tlf. 375036 áðrenn 10. februar.

## Silvurbrúdleyp

12. januar høvdu Johanna og Mannbjørn Olsen, Porkeri, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Porkeris skúla leygardagin 29. janaur kl. 19.00. Tey, ið vilja halda dagin saman við okkum, verða vinarliga biðin um at siga okkum frá áðrenn 20. januar á tlf. 373864 ella 262864. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Mikudagin 9. februar hava Karl og Anna Sofía Vidtfeldt, Sandur, verið gift í 25 ár. Veitslan verður hildin í Ungmannafelagshúsinum Samljóð í Skopun 19. februar 2005 kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið við at koma í veitslu, verða biðin um at siga frá á tlf. 211584, 361584 ella 224946 áðrenn 3. februar 2005.

## 40 ár

Fríggjadagin 21. januar verður Sigfríður Venned, Garðavegur 33, Klaksvík 40 ár. Dagurin verður hildin á Klaksvíkar Sjómansskúla í Klaksvík frá kl. 19.00. Øll eru vælkomin.

## 75 ár

Mánadagin 24. januar fyllir Kjartan Stakksund, Eiði, 75 ár. Føðingardagurin verður hildin í Missiónshúsinum Karmel kl. 18.00 fríggjadagin tann 28. januar. Øll eru hjartaliga vælkomin.